# 1. Inngangur

Álitið *RÁÐLEGGING FÓLKASKÚLANS - Fyrisitingarligur partur* verður lagt á heimasíðuna hjá Mentamálaráðnum (www.mmr.fo)

Endamálið við hesum áliti er:

- at greina, hvussu játtanin á fíggjarlógini til fólkaskúlan verður býtt skúlunum
- at geva haldgott innlit í ráðleggingina av tímatillutanini
- at kunngera møguligar nýggjar ásetingar og broytingar
- at gera eina heildarætlan fyri fíggjarárið
- at gera eitt fullfíggjað yvirlit yvir støðuna í fólkaskúlanum skúlaárið 2004/05
- at geva skúlunum eitt ávíst frælsi at umsita teir miðfirraðu tímarnar.
- at greiða frá øðrum viðkomandi spurningum hesum máli viðvíkjandi.

Ásetingar, sum eru gjørdar í álitum frammanundan, eru framvegis galdandi, uttan so er, at tær eru settar úr gildi í einum seinni áliti.

## 1.1 Tímajáttanin skúlaárið 2004/05

Skúlaárið 2004/05 verða tímarnir lutaðir skúlunum eftir sama býtislykli sum seinasta ár við ávísum tillagingum. Skúlarnir fáa játtað eitt ávíst tal av pultstímum umframt eitt tímatal til næmingar við serligum tørvi. Pultstímarnir eru til alt virksemi skúlans t.e. undirvísing, vikartímakvotu, vikartímar í sambandi við skeiðsvirksemi/eftirútbúgving hjá lærarum o.a. Í skúlaárinum 2004/05 kunnu skúlar nýta upp til 1,5 % av játtaðu pultstímunum til vikartímar í sambandi við skeiðsvirksemi/eftirútbúgving hjá lærarum. Skúlar við færri enn 15 næmingum kunnu gera seravtalur við Mentamálaráðið í sambandi við skeiðsvirksemi. Viðmerkjast skal, at vikartímar til skeið, sum vara alt skúlaárið, og har lærari hevur fingið játtað niðurskurð frá Mentamálaráðnum, verða ikki tiknir av játtaðu pultstímunum.

Treytir fyri tímatillutanini:

1. *Fult árgangsbýttir skúlar: ( skúlar við fleiri enn 115 næmingum)*
   Vanlig floksstødd er sett til 24 næmingar. Tó verða ikki latnir tímar til nýggjan flokk fyrr enn flokkurin fer upp um 26 næmingar, men eykatímar verða givnir soleiðis:

| | | Eykatímar | |
|---|---|---|---|
| Flokkur | Minsta tímatal | 18 < næm. < 25 | 24 < næm. < 27 |
| 1. | 18 | 5 | 7 |
| 2. | 20 | 5 | 7 |
| 3. | 24 | | 7 |
| 4. | 28 | | 7 |
| 5. | 30 | | 7 |
| 6. | 31 | | 7 |
| 7. | 31 | | 7 |
| 8. | 36 | | 5 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 9. | 36 | | 5 |
| 10. | 37 | | 5 |

*Dømi:*
*1. og 2. árgangur:*
*Eykatímar verða latnir, tá ið næmingatalið í hvørjum flokki er omanfyri 18 næmingar.*

| | | | |
|---|---|---|---|
| *Dømi:* | *48 næm.* | *:* | *tveir flokkar á 24 næmingar* |
| | *50 næm.* | *:* | *tveir flokkar á 25 næmingar* |

*3. - 10. árgangur:*
*Meginreglan er, at tá ið hesir árgangir verða býttir sundur í flokkar verður altíð býtt við 24 fyrst. Eru fleiri næmingar enn hetta, skulu hesir fara í sama flokk so vítt, sum tað ber til. Síðan verða eykatímar latnir sambært omanfyri standandi talvu:*

| | | |
|---|---|---|
| *49 næm.* | *:* | *tveir flokkar við ávikavist 24 og 25 næmingum* |
| *50 -* | *:* | *tveir flokkar við ávikavist 24 og 26 næmingum* |
| *51 -* | *:* | *tveir flokkar við ávikavist 25 og 26 næmingum* |
| *o.s.fr.* | | |

2. Miðfirrað serundirvísing er 11% av næmingatali skúlans.

3. Bókasavnstímar verða lutaðir skúlunum eins og áður, t.e. næmingatal –20 faldað við 0,06.

4. Reguleringsfaktorurin fyri fult árgangsbýttu skúlarnar er 3 % av næmingatali skúlans.

5. Í handaverki og list verður roknað við eini miðal bólkastødd, sum er tólv næmingar. Fimm tímar verða roknaðir til hvønn bólkin frá 3. til 7. flokk, tó sum desimaltal fyri hvønn árgangin. Síðani verður talt saman og rundað til heilt tímatal fyri allan skúlan.

6. *5 og 6 flokkaðir skúlar: ( skúlar við 69 – 114 næmingum)*
Tann einstaki skúlin verður floksbýttur eftir § 13 í fólkaskúlalógini, men í teimum førum, har árgangir verða lagdir saman í ein flokk, verða tímarnir til lægra árgangin drignir frá. Eykatímar verða latnir í teimum førum, har tveir árgangir eru lagdir saman til ein flokk, og næmingatalið fer upp um tey ásettu mørkini í pkt.1. Skúlin ræður tó sjálvur fyri, hvørjir flokkar verða lagdir saman í skúlaárinum.

7. Í handaverki og list verður roknað við eini miðal bólkastødd, sum er tólv næmingar. Fimm tímar verða roknaðir til hvønn bólkin frá 3. til 7. flokk, tó sum desimaltal fyri hvønn árgangin. Síðani verður talt saman og rundað til heilt tímatal fyri allan skúlan.

8. Miðfirrað serundirvísing er 11% av næmingatali skúlans.

9. Bókasavnstímar verða lutaðir skúlunum eins og áður, t.e. næmingatal –20 faldað við 0,06.

10. Reguleringsfaktorurin fyri 5. og 6.flokkaðu skúlarnar er 10 % av næmingatali skúlans.

10. *Skúlar við færri enn 70 næmingum*
Tímabýtislykilin er ikki galdandi fyri skúlar við færri enn 70 næmingum. Tímatillutanin til hesar skúlar verður gjørd við støði í bóklinginum Fólkaskúlin – tíma- og lærugreinabýti frá

1993. Tað hevur verið ein ójavni í býtinum til hesar skúlarnar, sum ikki stavar frá næmingatali. Skúlaárið 2003/04 var avgjørt, at hesin ójavni skal burtur, soleiðis at allir hesir skúlar fáa tímar eftir sama leisti. Tillagingar eru tí gjørdar í ávísum skúlum. Teir, sum hava fingið ov lítið, fáa í ár tað, sum teir eiga sambært leistinum.

Hjá teimum, ið hava fingið ov nógvar tímar, verða tillagingarnar gjørdar yvir tvey ár. Helvtin av muninum í tímatalinum var tikin seinasta ár og helvtin verður tikin komandi skúlaár. Hetta verður gjørt til tess, at minkingin í tímatalinum ikki skal hava so ógvusligar fylgjur. Næsta ár fáa allir skúlar í hesum bólkinum tímar sambært galdandi tíma- og lærugreinabýti. Umframt vanligu tímajáttanina er ein eykajáttan uppp á 143 vikutímar býtt lutfalsliga millum hesar skúlar. Miðfirrað serundirvísing er 11% av næmingatali skúlans. Bókasavnstímar verða lutaðir skúlunum eins og áður, t.e. næmingatal –20 faldað við 0,06.

11. *Skúlar við færri enn 10 næmingum*
Hædd er tikin fyri kravdum tímatali hjá næmingunum, umframt at rúm er gjørt fyri Vikartímum í sambandi við eftirútbúgving/skeið hjá lærarum.

Mentamálarráðið tillutar skúlunum tímar sambært omanfyri standandi ásetingum. Í 1990 var avrátt at geva tí einstaka skúlanum størri frælsi at skipa undirvísingina, soleiðis at hon hóskaði til viðurskiftini á staðnum, og at geva skúlunum eina ávísa ábyrgd viðvíkjandi fíggjarligum og námsfrøðiligum avgerðum.
Hóast farið er frá frymlaskipanini frá 1990, so eru tað framvegis skúlarnir sjálvir, sum gera av, hvussu teir nýta tillutaðu tímarnar. Eykatímar verða lutaðir skúlunum sambært talvu á síðu 1, men skúlarnir luta sjálvir einstøku flokkunum eykatímar eftir tørvi.
Skúlarnir skipa undirvísingina eftir tímatillutanini og í samsvari við galdandi reglur, soleiðis at næmingarnir fáa ta undirvísing, sum er fyriskipað sambært galdandi lóg. Gjørt verður vart við, at ásetingarnar í § 19 í fólkaskúlalógini skulu verða fylgdar.

## 2. Støðan skúlaárið 2004/2005

### 2.1 Barnatalið
Eftir teimum fyribils fráboðanum, sum skúlarnir sendu Mentamálastýrinum í februar 2004, eru 7712 næmingar í mun til 7713 í februar 2003. Næmingatalið skúlaárið 2004/05 er sostatt umleið tað sama sum í 2003/04.

### 2.2. Lærarasetanir
Skúlastýrini, ið hava heimild í § 50 í fólkaskúlalógini skulu m.a.taka sær av starvssetanum. Skúlastýrið skal:

?? seta lærarar í tíðaravmarkað starv eftir tilmæli frá skúlaleiðaranum
?? gera tilmæli til landsstýrismannin um setan og uppsøgn av skúlaleiðarum
?? gera tilmæli til landsstýrismannin um setan og uppsøgn av varaskúlastjórum, lærarum og øðrum starvsfólkum

Skúlaleiðarin setir lærarar í fyribilsstørv t.e. størv, ið eru styttri enn 3 mánaðar.

Til skúlaárið 2004/2005 verður álagt skúlastýrunum í samráð við skúlans leiðslu at lýsa øll tíðaravmarkað størv leys. Skúlastýrini skulu seta lærarar í neyðugum vavi til allar teir leysu tímarnar (sjúkravikartímar tó undantiknir).

Tíðaravmarkaðu størvini skulu helst lýsast sum heil størv. Talið á lærarum í tíðaravmarkað størv, ið ætlanin er at seta í hvørjum skúla og væntaða tímatalið, skal verða kunngjørt í lýsingini eftir lærara í tíðaravmarkað starv.

**2.3 Endaliga tímajáttanin**
Næmingatal skúlans verður endaliga uppgjørt 1. september 2004, og tímajáttanin verður síðan javnað samsvarandi. Í sambandi við ráðleggingina av skúlaárinum eiga skúlarnir at hava í huga, at ein minking í næmingatalinum í einstøkum flokki í ávísum føri kann hava við sær, at flokkatal skúlans verður minni, og at tímatalið sostatt verður skert samsvarandi.

**2.4 Leysa vikartímakvota skúlans**
Leysa vikartímakvotan verður framvegis roknað fyri alt skúlaárið t.e. 48 vikur, men uppgjørt verður við árslok soleiðis, at mest møgulig javnvág fæst millum skúlaár og fíggjarár.
Skúlarnir fáa við skúlaársbyrjan at vita, hvussu stór leysa vikartímakvotan verður til árslok 2004. Avlop verður ikki flutt yvir um kalendaraár. Um so er, at ein skúli hevur ovurnýtslu á leysu vikartímakvotuni við árslok, verður henda ovurnýtsla mótroknað í kvotuni fyri seinnu helvt av skúlaárinum.

**2.5 Tali- og hoyrilærarar**
Í yvirlitinum yvir skipað størv eru tali- og hoyrilærararnir ikki íroknaðir. Hetta kemst av, at vanliga hava hesir lærarar ikki tímar - ella bert nakrar fáar á tímatalvu skúlans, og ávirka tí ikki tímanýtslu skúlans.

Tali- og hoyrilærarar eru settir í starv í hesum starvsøkjum:

| | |
|---|---|
| Norðoyggjar | 15 tímar/v |
| Eysturoy<br>Norðstreymoy | 35 " |
| Suðurstreymoy | 66 " |
| Vágoy | 10 " |
| Sandoy | 5 " |
| Suðuroy | 28 " |

**2.6 Ráðgevar**
Umframt tali- og hoyrilærararnar, sum eru settir í fast starv, og sum hava starvsøki í fleiri skúlum ella ávísum øki, starvast eisini nakrir serlærarar sum ráðgevar í skúlaøkjum. Hetta eru ikki føst størv, men teir, sum settir eru, hava partvíst ella fult farloyvi frá tí skúla, teir eru settir í. Hetta ávirkar sjálvsagt tímatalið í teimum skúlum, har teir eru settir í starv.

Øki, har hesir ráðgevar starvast, eru:

| | |
|---|---|
| Norðoyggjar | 20 v/tímar |
| Eysturoy<br>Norðstreymoy | 26 |
| Suðurstreymoy | 29 |

| | |
|---|---|
| Vágoy | 8 |
| Sandoy | |
| Suðuroy | 24 |

Á Landsmiðstøðini virka lærugreinaráðgevar. Teir eru lutvís settir við starvsøki í Mentamálastýrinum við tilsamans 88 tímum/viku.

## 3. Fíggjarætlanin fyri skúlaárið 2004/05

Játtanin í 2004 til fólkaskúlan er kr. 214.923.000.

Talva 1. vísir, at 19.660.000 kr eru settar av til eftirútbúgving, stuðul til avbygdanæmingar, praktikk hjá læraraskúlanum, eftirløn til sáttmálasettar lærarar og annað. Tað, ið eftir er, verður nýtt til læraralønir. Samanlagt er hetta kr. 195.263.000.

Virksemi fólkaskúlans í læraralønartímum verður ásett soleiðis, at miðallæraralønin verður býtt upp í tøku lønarjáttanina og síðan verður javnað fyri meir- ella minninýtslu um várið.

Miðalkostnaðurin av einum læraralønartíma er mettur til kr. 230,66. Fortreytirnar fyri útrokningunum eru vístar í talvu 2.
Sambært talvu 3 er tøka tímajáttanin til fólkaskúlan um vikuna 17.592 tímar. Talva 4 vísir, hvussu hesir tímar verða býttir til tey ymsu endamálini í fólkaskúlanum.

### Talva 1

**Útrokning av tøkari játtan til tímabýti**

| | **uppskot 2004** |
|---|---|
| Játtan til fólkaskúlan | 214.923.000 |
| Játtan til sernámsfrøðiligt virksemi í fólkaskúlanum | |
| Játtan tilsamans | |
| Eftirútbúgving | -2.000.000 |
| Studningur til avbygdanæmingar | -200.000 |
| Praktikk læraraskúlin | -450.000 |
| Annað* | -3.510.000 |
| Eftirlønir sáttmálasettir | -13.500.000 |
| Eftir til tímaútrokning | 195.263.000 |

## Talva 2

| Miðaltímatakstur | 2004 |
|---|---|
| Miðaltakstur / tíma primo v. reg. og u. arbg. g. | 219,47 |
| Lønarhækkan 1.1 | 0,50% |
| Lønarhækkan 1.3 | 2,83% |
| Lønarhækkan 1.7 | 0,94% |
| Anncinitetsbroytingar | 0,70% |
| Trygdargrunnur | |
| Arbeiðstrygging | 0,13% |
| Barnsburðargrunnur | |
| Tímasatsur írokn. reg. og arbeiðsg. g | 230,66 |

## Talva 3

| Útrokning av tøkum tímatalið fyri fólkask. | 2004/05 |
|---|---|
| Tøk tímanýtsla | **17.592** |
| Játtan | 214.923.000 |
| | |
| Útreiðslur frátrektar áðrenn tímabýti | -19.660.000 |
| Útreiðslur eftir til tímabýti | 195.263.000 |
| | |
| Roknaður tímatakstur | 230,66 |

## Talva 4

| Virksemið í fólkaskúlanum | 2003/04 | 2004/05 |
|---|---|---|
| | **nýtsla** | **uppskot** |
| **Lisnir tímar í skúlunum** | | |
| Pultstímar íroknað miðfir. serundirv. | 14.650 | 14.417 |
| Tímar fyri leiðslu | 797 | 795 |
| Tímar til ráðlegging | | |
| Tíma niðurskurður | 1951 | 2131 |
| | | |
| **Tilsamans tímar givnir skúlum** | **17.398** | **17.343** |
| | | |
| **Annað virksemi innan fólkaskúlan** | | |
| | | |
| Lærugreinaráðgevarar | 44 | * 0 |
| Føroya Lærarafelag | 22 | 22 |
| Eftirútbúgving | 90 | 100 |
| Annað so sum susp. og sjúka | 127 | 127 |
| **Tilsamans annað virksemi** | **283** | **249** |
| | | |
| **Samlað virksemi (tímar/viku)** | **17.668** | **17.592** |

* *tímarnir til lærugreinaráðgevarnar eru fluttir til Landsmiðstøðina*